# Vilja leggja dent á betraða tænastu

**Um føroyskir innflytarar fara at merkja nakra broyting í tænastuni hjá Skipafelagnum, nú felagið hevur fingið nýggjan eigara, so verður tað í víðkaðum vøruhotelli og fleiri farmaleiðum enn fyrr, sigur Árni Joensen, stjóri**

LOGISTIKKUR

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



*Eigaraskiftið inniber ongar kollveltingar, og kundin skal ikki merkja nakað til broytingar annað enn at tænastustigið hækkar, sigur Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum Føroyar.*

*Foto: Jens Chr. Vang*

Ein týðandi táttur fyri virkir ið innflyta nógvar vørur, vil altíð snúgva seg um goymslu og logistikk. Spurningar um pláss og hvussu vørugoymslan sum best kann skipast í mun til virksemi og viðskiftafólk eru væl kendir. Ein nýmótans metoda sum ofta loysir trupulleikar í hesum sambandi er at gera nýtslu av vøruhotelli, og júst hetta er nakað sum Skipafelagið Føroyar nú fer at leggja størri dent á enn fyrr.

»Okkara tænasta við vøruhotelli kann í mongum førum vera ein búskaparliga og fíggjarliga skilagóð loysn,« segði Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum Føroyar, og vísti á tann økta kapacitet á hesum øki Skipafelagið hevur fingið síðani samanleggingina við Eimskip.

»Vøruhotellið gevur føroyskum innflytarum eyðsæddar fyrimunir: við at gagnnýta tað sleppa teir heilt einfalt undan høvuðbrýggi av spurningum um vørugoymslu. Teir kunnu ístaðin gera nyttu av tí stóra kapaciteti vit hava á økinum og leggja meira av sínari arbeiðsorku í sítt egna virksemi. Vøran stendur trygt og væl á okkara goymslum og tað er ómakaleyst at fáa út partar av henni so hvørt sum tørvur er á tí. Innflytarin avger sjálvur um hetta skal fara fram við egnari avheinting ella útkoyring frá okkum, beinleiðis til kundan ella til egna goymslu.«

Tann 1500 fermetrar stóra goymsluhøllin sum Skipafelagið júst hevur yvirtikið frá Eimskip, tekur góð 1000 plattapláss. Við hesum hevur felagið nú tilsamans yvir 8000 fermetrar í goymsluplássi til sínar kundar, harav góðar 5000 fermetrar í Havn og restina í Runavík, í Klaksvík og á Tvøroyri. Harafturat bjóðar felagið frysti- og køligoymslu til útflytarar av fiski og matvørum annars.

## Leiðir fleirfaldaðar

Samstundis verður smidligari enn nakrantíð at innflyta vørur úr øllum heimsins heraðshornum, við tað at beinleiðis farmaleiðir nú ganga úr USA, Hollandi, Týsklandi, Íslandi, Svøríki og Norra umframt, sum í nógv ár hevur ligið í fastari legu, úr Danmark og Stóra Bretlandi.

»Kundarnir skulu sum heild ikki merkja nakað til eigaraskiftið í Skipafelagnum,« segði Árni Joensen, »uttan tað at tænastan er vorðin betri.«

»Skipafelagið Føroyar verður verandi sama felag við somu leiðslu og starvsfólkum, og so við nøkrum av starvsfólkunum frá Eimskip sum eru komin afturat. Flutningsnetið verður munandi betrað, og við ferðaætlanini hjá Eimskip aftur at tí ferðaætlan vit høvdu frammanundan, so kunnu vit nú bjóða okkara kundum beinleiðis flutning til og frá fleiri londum enn nakrantíð fyrr.«

# Skipafelagið styrknar í trúnni á miðdepil í Norður Atlantshavi

**Visiónin um Føroyar sum miðdepil fyri sjóvinnu fær nøkur nýggj perspektiv, nú Skipafelagið og Eimskip samskipa seg í víðfevnandi norður atlantiskum kervi**

SJÓVINNA

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



*Starvsfólk hjá Skipafelagnum í tænastu fyri ein kunda.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

Tey seinastu 10 árini hava fleiri innan vinnulívið og tað almenna málað upp eina vónaríka mynd av Føroyum sum ein natúrligur miðdepil fyri sjóvinnu í Norður Atlantshavi, við tænastum, framleiðslum og øðrum veitingum at bjóða skipum og boripallum á okkara leiðum.

Hóast myndin av miðdeplinum lættliga hvørvur úr hugaheimum vanligar gerandisdagar, so tónar hon týðiliga fram aftur í ljósinum av tí nýliga víðkaða flutningsnetinum hjá Skipafelagnum Føroyar.

»Tað áhugaverda í okkara støðu er at vit eru partur av einum bólki sum hevur bygt upp eitt umfatandi flutningskervi í Norður Atlantshavi við víðfevnandi vinnuligum periferium,« hugleiddi Tórheðin Jensen, marknaðar- og sølustjóri á Skipafelagnum.

Tórheðin Jensen vísti til tær logistisku loysnir ið longu eru tøkar í Føroyum, við øllum frá flutningstænastum, vøruhotelli og frystihotelli til mekaniskar umvælingar, frá fiskivinnu útgerð og elektriskum installatiónum til proviantering, kunningar og samskiftis tøknifrøði og annað.

Men meira skal til viðhvørt, og geografiskt eru Føroyar partur av einari størri norður atlantiskari región sum eisini fevnir um okkara næstu grannar Skotland, Noreg og Ísland.

»Eg kundi nevnt sum eitt áhugavert dømi at CTG Coldstore & Transport Group, ein norskur veitari sum eigur og rekur bæði farmaskip og frystihotell, fyri ikki langari tíð síðani var integrerað í bólkin… Eitt er at vit hava slíkar facilitetir í Føroyum, men at vit somuleiðis kunnu hava teir tøkar í grannalondum, kann uttan iva styrkja okkum í altjóða kapping.«

»Tað stutta av tí langa er at netið hjá Skipafelagnum er útviklað og víðkað munandi orsakað av samanleggingini við Eimskip. Hetta ger í sínum lagi at vit nú fáa betri møguleikar enn nakrantíð at menna Føroyar sum miðdepil í Norður Atlantinum; hetta er jú í forvegin eitt rættiliga framkomið og samstundis sjóvant oyggjaland hvørs natúrliga styrki liggur í tí sum hevur við sjógvin at gera, og tá meini eg eisini við ídnað og handil á landi.«



